# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin 30. november 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:**

**Fundurin lokin kl. 21.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **14/00085**<br>**Fyrispurningur viðv. øki til kampingpláss - summarhús**<br>Ultimo januar 2014 hevur kommunan móttikið umsókn/fyrispurning um møguleika fyri at byggja bygningar á økið sum var ferjulega og nú er broytt til báthyl. Økið hevur áseting sum C2 sum er vinnu- og miðstaðarbygging við serstakari byggisamtykt.<br><br>Byggi- og býarkipanarnevndin mælir til at umsøkjari fær loyvi at nýta økið sambært innsenda uppskoti, men endalig umsókn og tillaging av bygging á økinum við fráleikum o.a. skal gerðast í samráð við kommununa<br><br>Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarkipanarnevndini og vinnunevndini. |
| 2. | **15/00381**<br>**Umsókn um vinnuøki**<br>Komunan hevur móttikið umsókn um øki til vinnubygning, umsøkjarin hevur víst á økið við bátahylin í Leirvík.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til, at umsøkjari fær loyvi til byggiøki og kommunan vísir á, hvar í vinnubygningur kann verða staðsettur á C2 øki við bátahylin í Leirvík.<br><br>Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarkipanarnevndini og vinnunevndini. |

# Fundarbók hjá Eysturkommunu ____/____ Síða
# 520 Leirvík

Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig,skr.

**Býráðsfundur mánadagin 30. november 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:**

**Fundurin lokin kl. 21.30**

**3. 15/00352**

**Umsókn um gerð og uppsetan av gongugøtu í Syðrugøtu**

Grannalagið í Tungu, Syðrugøta hevur arbeitt við fríðkanar- og trivnaðarátaki síðani 2012, har m.a. er planta yvir 2000 runnar og trø, gøtur eru gjørdar og hugnaljós (ljóspullertar) eru við at verða sett upp.

Bólkurin " Grannalagið í Tungu " hevur sent umsókn um at gera eina gongubrúgv sum skal monterast á uttaru síðu av garðinum hjá Atla Gregersen. Bólkurin hevur eisini fingið eina kostnaðarmeting uppá hetta arbeiði, og er henda umsókn ynski um, at seta pengar av í fíggjarætlanini fyri 2016 til gongubrúnna.

Málið er viðgjørt í byggi- og býarkipanarnevndini og har mælir Hanus Jacobsen til at gongubrúgvin verður gjørd í 2016. Ólavur Olsen mælir frá at gera gongubrúnna í 2016, men at brúgvin verður sett á játtanina í fíggjarárinum 2017. Hanna Jensen mælir til – um tað er møguligt at finna fíggingina í 2016 – at gera gongubrúnna.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá Hannu Jensen.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Hannu Jensen og fíggjrnevndini

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Emma Rasmussen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen.

**Atkvøddi blankt:**
Hanus Jacobsen.

**4. 15/00374**

**2.viðgerð av eykajáttanum oktober 2015**

Við 1.viðgerð bleiv samtykt at veita eykajáttan á íalt 1.060.000,00 kr. samb. fyriliggjandi yrirlitið frá umsitingini. Eykajáttanirnar verða fíggjaðar við at 110.000,00 kr. verða tiknar av konto 1.11.21.510 (kommunufeløg), og rest 950.000,00 kr. verða tiknar av innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð., og harumframt at veita eina eykajáttan til skúlan á 90.000,00 kr.

**Býráðsfundur mánadagin 30. november 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:**

**Fundurin lokin kl. 21.30**
og samtykt við 1. viðgerð.

**5. 15/00345**
**2.viðgerð av fíggjarætlan fyri 2016**
Fíggjarnevndin skal gera uppskot til fíggjarætlan at leggja fyri býráðið.

Fíggjarnvendin mælir til fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri 2016.

Skattaprosentið verður óbroytt 21, og barnafrádrátturin verður eisni óbroyttur 5.000,00. kr.

Samlaður rakstrarútreiðslurnar verða 73.097.000,00 kr., rentuútreiðslunar verða 2.087.000,00 og avdráttirnir verða 6.145.000,00 kr.

Samlaðu inntøkurnar verða 88.827.000,00 kr. harav 16.027.000,00 kr. er afturbering frá landinum fyri eldraøkið.

Samlaðu íløgurnar verða 34.470.000,00 kr.

Lántøkan í 2016 verður 15.000.000,00 kr.

Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti hjá fíggjarnevndini til fíggjarætlan fyri 2016.

# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



## Býráðsfundur mánadagin 30. november 2015 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Ikki á fundi:**

**Fundurin lokin kl. 21.30**
**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________